tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Oljan og fullveldið

## *Oddagrein*

ALLIR fjølmiðlarnir her heima og eisini nógvir í Danmark hava gjørt nógv burtur úr samráðingunum í Keypmannahavn í vikuni. Meðan okkara heimligu miðlar bera tíðindi frá okkara samráðingarfólkum um góðar og konstruktivar samráðingar, har danska stjórnin hevur víst seg at ganga mongum av ynskjum okkara á møti, so er tónin ein annar í donsku miðlunum. Har verður næstan øvugt víst á, at harða danska linjan heldur fram, og at føroyska samráðingarnevndin fekk lítið og einki burtur úr. Eitt er sjálvandi, hvussu samráðingarfólkini sjálvi útleggja úrslitið, eitt annað er, hvussu miðlarnir og viðmerkjarar gera tað. Tí verður eisini áhugavert at hoyra tær viðmerkingar, sum koma aftrat.

EIN spurningur, sum ikki hevur verið nógv umrøddur, men sum er vorðin nevndur í bløðunum og eisini á sjálvum tíðindafundinum er tann leiklutur, sum møguligar framtíðar oljuinntøkur kunnu ella skulu hava í samráðingunum og í framtíðar viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark. Tað ljóðar, at føroyingar hava nevnt møguleikan fyri at gera oljuinntøkur til part av eini samráðingarloysn. Nyrup staðfesti á tíðinafundinum, at oljan hevði verið uppi og vent undir samráðingunum. Hvat tað so enn merkir.

EFTIR samráðingarnar er komið fram, at bæði Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin eru fyri at útseta tað teir kalla ígildiskomanina av einum sáttmála millum Danmark og Føroyar. Hvat liggur í hesum kundi verið áhugavert at vita meira um. Gitt kann sjálvandi verða um eitt og annað. Sjálvandi kann ein orsøk vera, at hesir flokkar hava fingið kaldar føtur og ikki longur eru hugaðir at tvinga seg sjálvar til at fylgja linju Tjóðveldisfloksins um eina skjóta tilgongd í hesum máli.

MEN kann eisini annað liggja aftan fyri sum t.d. oljukortið, sum samráðingarnevnd okkara spældi út ella bara minti danir á undir samráðingunum? Formaður Tjóðveldisfloksins hevur fleiri ferðir sagt, at møguligar komandi oljuinntøkur skulu ikki tengjast saman við fullveldisætlanini. Men nú tá føroyska nevndin hevur fingið greitt at vita frá dønum, at skiftistíðin verður ikki fleiri enn tey umrøddu 4-5 árini, so kann sjálvandi hugsast, at sami Tjóðveldisformaður er farin at hugsa um „oljukortið“ og harvið er gingin við til at minka eitt sindur um fullveldisferðina. Tí soleingi vit ikki vita, um olja finst ella ikki, so kann hetta „trumfkort“ ikki brúkast í praksis, hóast tað í dag er góður tónleikur í hugaheiminum. Landsstýrið er sjálvandi vitandi um og roynir at rudda slóð fyri, at oljufeløg kunnu seta hol á landgrunnin longu í næsta ár. Tvs. umleið eitt hálvt ár, áðrenn løgtingsval verður aftur. So eitt tankaeksperiment kundi verið hetta, at landsstýrið hevur einki ímóti at leggja fullveldismálið á ís til møgulig olja spríkir upp úr undirgrundini. Men tað hevur brúk fyri, at hetta hendir áðrenn valið í mai 2002.

Í HESUM sambandi er eisini vert at taka í aftur tað, sum fyrrverandi formaðurin í donsku ráðleggingarnevndini viðv. Føroyum, Skakk-Nielsen segði við Sosialin í fjør. Høvuðsboðsskapur hansara var tann, at lykilin til føroyskt fullveldi ella sjálvstýri uttan danskan blokk vóru komandi oljuinntøkur. Uttan tær og við eini stuttari skiftistíð fyri avtøku av blokki metti hesin danski búskaparfrøðingurin, at fullveldisætlanin hjá landsstýrinum ongan sum helst møguleika hevði. Tað er helst hetta, sum landsstýrið og ikki minst formaður Tjóðveldisfloksins tigandi hevur sannað. Nú er at bíða eftir oljuni. Tað merkir so aftur, at tað bara er ein spurningur um tíð, nær landsstýrið fær rætta høvið at leggja eina nóg trygga ætlan til fólkaatkvøðu. Men tað er eisini ein spurningur um at renna kapp við tíðina. Tí oljuleitingin byrjar á heysti ár 2001, og vit skulu hava val á vári 2002. Spurningurin er so, um ikki danir við at lata okkum fulla rættin til undirgrundina, eisini góvu okkum besta trumfkortið til sjálvstýri ella fullveldi. Onkur hevur so ivast í, um vit løgfrøðiliga eiga henda rætt. Um ikki, so er greitt, at danir eiga at týðandi kort í hondini, vilja teir partú varðveita Føroyar sum ein part av ríkinum. Time will show.

***Sosialurin***

Viðmerking:

# Landbúnaður, sanering v. m.

Undirritaði ið er føddur í 1937 sum arvingi til festi í Innistovu á Trøllanesi, havi búð og livað av jarðarbrúki alla mína tíð, festi eftir faðir mín í 1968. Sama ár bleiv nýtt fjós bygt við tíggju básum, men vegna táverandi um støður vóru ongantíð meira enn seks mjólkikýr í fjósinum. Tá ið so vegasambandið kom í 1985 so komu eisini aðrir møguleikar, fyri tað fyrsta so slapp man av við framleiðsluna, man brendi ikki inni við mjólkini vegna brim og illveður og haraftturat opnaðu seg stórir møguleikar fyri útbygging av garðinum, soleiðis at meira enn ta eina húski kundi fáa sína útkomu av garðinum.

Havandi í huga at nú var næsta ættarlið komið til og um tað skuldi støðast í bygdini so mátti útkoma til. Við hesum í huga varð søkt til Jarðarráðið um loyvi at velta og byggja nýtt fjós, í fyrsta umfari høvdu vit fimtan hektarar tøkar til velting. Okkum bleiv játtað lán til velting og enntá tilsøgn til nýtt fjós. Hóast lán bleiv játtað, so síggi eg nú aftaná, at í staðin fyri at siga nei, so varð lánið sett so mikið lágt, at Jarðarráðið hevur roknað við at veltingin bleiv av ongum, men tann írestandi peningurin varð fingin tilvega privat og so varð farið til verka.

Fyri ikki at kollrenna okkum fíggjarliga, sum so mangur annar, við at byggja fjós fyrst og so velta aftaná, so tóku vit raðfylgjuna mótsatt, vit veltu fyrst nøkur ár, men meðan velt verður, verður fjóstilsøgnin tikin aftur av Jarðarráðnum. Eg varð heilt ovfarin, men sjálvandi kundi man ikki taka hetta fyri fult, so hildið var fram við veltingini til goymslurnar ikki kundu taka alt fóðurið og verandi fjós var meira enn fult av neytum.

So varð aftur farið til Jarðarráðið, men at sleppa at byggja fjós var kortanei og tann ætlanin, ið eg hevði til loysn av goymslutrupulleikunum av fóðri, varð koldømd sum ónýtilig, hetta var ein stálbrunnur við sjálvvirkandi ífylling og úttøku. Hetta anlegg var tó ikki verri enn so, at á sama fundi í Jarðarráðnum fekk bóndi í Suðurstreymi játtan til líknandi ætlan og enntá fitt av básum játtað afturat verandi fjósi.

Tað keðiliga við hesi játtan var, at tá ið eg tosi við umboðsmannin í Danmark fyri at siga honum at Jarðarráðið noktar at fíggja, so sigur hann: »Jamen, Jordefonden har finansieret anlægget til bonden i…«

Tá hetta góða anlegg kundi nýtast í Suðurstreymi, so kundi tað saktans eisini nýtast hjá okkum og so varð stálsiloin keypt og fíggjað privat. Tveir mánaðar seinri koyrdu vit fyrsta grasið inn.

Tá ið Jarðarráðið hvørki kundi játta mær fjós ella brunn, so mundu teir hava hildið at tað var nóg so skallut at fara út aftur við ongum og bjóðaðu mær eina høll sum kundi nýtast til plansilo og goymslu, tá ið so Jarðarráðið bjóðaði galdandi studning til súrhoyggjbrunnar til høllina, so tók eg av, men at brúka høllina bæði til súrhoyggj og amboð bar ikki til, og tá eg hevði loyst goymslutrupulleikarnar til gras privat, so bleiv høllin nýtt til amboð og annað.

Men sum áður sagt, so hekk ein játtan um studning til súrhoyggjbrunn uppi í høllini, tá høllin stóð liðug tók Jarðarráðið studningstilsøgnina aftur. So varð søkt um studning til súrhoyggjbrunnin og varð hesin útgoldin fýra ár eftir at brunnurin varð tikin í nýtslu. Studningur til súrhoyggjbrunnar verður latin pr. kubikkmetur, so tá ið studningurin bleiv goldin út var hann bert umleið helvtin av upprunaligu játtanini.

Havi ongantíð átt nakað av týdningi á festikontoini, men táið komandi festari hoyrdi, so keypti hann grundstykki burtur av festinum, og fór hesin peningur ca. 20.000 kr. á festikontoina. Tá ið so undirritaði bað um peningin til nýtslu á festinum, var mær játtað lán uppá 50.000 kr. sum eg sjálvandi tveitti aftur, fekk eg ikki tað ið stóð á festikontoini so skuldi eg onki hava. Tá bleiv so festikontoin endaliga útgoldin.

Seinasta, ið eg havi hoyrt frá Jarðarráðnum um fjósbygging er, at teir vilja strekkja seg til eitt básatal sum er á leið tað sama básatalið, ið abbi hevði í kjallaranum, tá ið hann bygdi fyrst í øldini.

Annars er tað soleiðis at fígging fæst til fjós bert við at ringja til Sparikassan, altso Norðoya Sparikassa. Men ger man nakað á festinum so kannar Jarðarráðið sær hetta, sambært rundskriv frá ráðnum, viðvíkjandi rættindum og skyldum hjá festarum. Rættindunum vóru ikki tey stóru, men skyldurnar vóru haraftur ímóti mangar. Sum til dømis: Alt arbeiði, ið er gjørt ólønt á garðinum. Øll bygging, ið er gjørd á garðinum, hettar kannar Jarðarráðið sær, sjálvt um fíggingin er privat og sjálvt sethúsini, ið abbi bygdi í 1908 og ongantíð nøkur almenn króna hevur verið í, hetta kannar Jarðarráðið sær. Ja soleiðis verður arbeiði okkara niðurgjørt, meðan teir garðar, ið fingu fulla fígging, bæði til velting og bygging í so ríkiligt mát at teir hoyknaðu undir vælvildini frá Jarðarráðnum, nú skulu sanerast.

Tíverri eri eg ikki tann einasti í útjaðaranum sum soleiðis er viðfarin, tað eru eisini onnur dømi um hetta. Eg fekk tilboð um at grasframleiðslan á garðinum skuldi latast sum hoyggj til rossamenninar í Havn!

Onkur annar fekk smokt eitt slaktineytafjós niður yvir herðarnar beint eftir at eitt líknandi fjós bleiv stongt! Tí tað bar seg ikki! Og uppaftur onkur annar fekk tilboð um at gevast við mjólkarframleiðslu, tí tað kláraðu teir sunnanfyri.

Tað er óneyðugt at siga hvar hesi tilboð koma frá. Tað sum kann geva nakað av sær skal dragast inn í miðstaðarøki.

Her í bygdini eru trý fjós við eini mjólkarkvotu uppá ca. 110.000 litrar í alt, neyvan nakar einstakur bóndi í miðstaðarøkinum hevði verið nøgdur við so lítla kvotu. Hesari kvotu liva fýra húski av.

Tann roynd at skapa eitt arbeiðsupplegg afturat í bygdini, ið vit fyri skjótt mongum árum síðani fór undir, bleiv kalt og miskunarleyst steðgað í hálvum gekki av Jarðarráðnum. Hetta eina arbeiðsplássið her í bygdini svarar til umleið 800-1000 arbeiðspláss í miðstaðarøkinum!

Sambært mínum festibrævi og væl saktans øllum øðrum festibrøvum, so skal bóndin búgva í festinum og vit hava einki annað alternativ til landbúnaðin, til at lívbjarga okkum.

Skulu ávísir bøndir sanerast, so er ikki ov nógv kravt, at vit, ið eru hildnir uttanfyri fígging úr Jarðargrunninum, ella ikki hava ligið sama grunni til byrðu, fáa ognarbrøv til festini uttan nakað viðurlag. Tað hevði í hvussu so er verið ein »trøstpremia«.

Annars er bert eftir at skoyta uppí, at her í oynni er skuldin til Jarðargrunnin neyvan størri, enn at hon kundi verið goldin aftur við eittans varsli.

**Jógvan Joensen, bóndi, Trøllanes**

## Tøkk

Øllum tykkum mongu, ið komu meg í hug og á ymiskan hátt heiðraðu meg á 75 ára føðingardegi mínum tjúgunda dag, takki eg hjartaliga.

Eina serstaka tøkk fyri ta sera hugnaligu morgunstund saman við Emmauskórinum og Hornorkestrinum.

Bestu heilsanir

**Hjørleif Waag Høgnesen**
**Klaksvík**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá ið elskaði maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**SÍMIN PETUR RASMUSSEN**
Haraldsund

doyði og varð jarðaður.

Fyrst vilja vit takka Áslu og Markus fyri teirra hjálp og beinasemi. Takk fyri blómur, kransar, uppringingar og til tykkum, sum komu inn á gólvið. Tøkk til Niels Paula Danielsen prest, fyri stóra hjálp og troystarrík orð.

Tøkk til kirkjutænarar, sangarar, berarar og til Hans Andrias á Hædd fyri beinasemi, tað var gott at tað kundi lata seg gera at koyra heim til hús, áðrenn farið varð til Kunoyar. Eisini ein tøkk til Emmauskórið fyri vakran sang. Tøkk til tykkum øll, ið hjálptu til í bygdarhúsinum.

Takk fyri gávur til Kunoyar kirkju og tøkk til tykkum øll, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*

**Sigga**



# Løgreglan ger grein 13 kanningar

Tey seinastu tvey árini hevur politiið gjørt sokallaðar grein 13 kanningar av ferðsluni, beint eftir at Ráðið Fyri Ferðslutrygd hevði havt sítt átak um ljós.

Trygdarspurninginum verður ikki givin nóg stóran ans í ferðsluni, tí stutt eftir vóru dømi um bilar, har ljósini ikki vóru í lagi.

Kanningar vísa eisini tað, at førarnir ofta ikki hava koyrikortið hjá sær. Tey í bilinum eru ikki øll líka røsk at nýta trygdarbeltið.

Hesum - og um øll hava skift dekkini til summardekk - fer politiið serliga at kanna í mai og nakað inn í juni mánað.

Sjálvandi vóna vit ikki, at bøturnar gerast ov mangar. Hetta fáa vit tó ikki at vita fyrrenn kanningarnar eru liðnar.




# Musikkskúlastevna um vikuskiftið

Árliga musikkskúlastevnan, har allir musikkskúlar í musikkskúlaskipanini eru við, verður í Eysturskúlanum og Norðurlandahúsinum um vikuskuiftið.

Konsertir verða í hesum sambandi í Norðurlandahúsinum fríggjakvøld og leygarkvøld við einstaklingum og bólkum, sum eru fyrireikaðir heimanífrá, og sunnudagin verður tað framført, sum bólkarnir hava lært á stevnuni.

Næstan 400 næmingar eru við hesaferð, og teir leika saman í rútmiskum bólkum, í Big Band, á klaver og gittara, í hornorkestri, blási- og strúkiorkestrum, og sangarar eru eisini við.

Allir bólkar venja í Eysturskúlanum, meðan klaverleikarar venja í hølunum hjá Tórshavnar Musikkskúla.

Konsertirnar fríggjakvøldið og leygarkvøldið eru ókeypis, men sunnudagin verður kostnaðurin Kr 20,- fyri atgongumerki.



# Seks í pyjamas á Oyrabakka

Komandi vikuskifti fer Klaksvíkar Sjónleikarfelag til Oyrabakka við skemtileikinum »Seks í pyjamas«, har spælt verður fríggjakvøldið kl. 21, leygardagin kl. 17 og 20 og sunnudagin kl. 17.

Undirtøkan til leikin hevur verið sera góð. Útivið 2.300 fólk hava sæð leikin higartil og bert tveir leikir hava áður megnað at savnað so nógvar áskoðarar. Tað vóru leikirnar Landastrokið, ið varð spældur í 1982 og Sildarok, ið var framførdur í 1989.

Atgongumerki til sýningarnar á Oyrabakka kunnu bíleggjast á telefon nr. 222068 og í Eydnuni, telefon nr. 422322, 1 tíma undan sýning.

Eftir framførslurnar á Oyrabakka verður farið til Suðuroyar, har spælt verður í Roynhøllini leygardagin 13. mai.

# Landstevna hjá Javna ár 2000

Javni skipar fyri mentunarstevnu 5.-7. mei 2000.

Listaframsýning verður í smiðuni í Lítluvík 5. mei kl 17:00, Elin Lindskov setur framsýningina.

Leygardagin 6.mei kl 10.00 verður skrúðgonga frá Bursatanga niðan í Grasagarð har Høgni Hoydal setur stevnuna.

Eisini verður fimleikaframførsla-felagssangur o. a

kl 10-16 verður listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Kl 13-16 opnar Verkhúsið Virkni við framsýningini „Atlantis“ ein ferð eftir havins botni.

6. mei 2000 kl 18:00 verður veitsla við harmonikudansi og frásøgufólkum.

Kostnaður:
Vaksin 150
Børn 7-14 ár hálvan prís.

Sunnudagin 7. mei verður Gudstænasta í Havnar kirkju við Bjarna Bæk.

Báðar listaframsýningarnar eru opnar frá kl 14-17.

# Bilframsýning í Vágum 2000



FS-Vágar fer aftur í ár at hava eina bilframsýning í Ítróttarhølliniá Giljanesi. Framsýningin verður vikuskiftið tann 06. og 07. mai.

Síðsta vár, tá framsýningin var, tóku fólk sera væl undir við tiltakinum og vóru umleið 1300 vitjandi (vaksin) í høllini. Sum skilst kom væl burturúr, eisini hjá framsýnarunum.

Fyri at geva framsýnarunum so gott pláss sum til ber, er plássið avmarkað til 7 bilhandlarar. Hesir eru Norðbil, Reyni Service, Jóhannes Berg, P/f Bilsølan v/Øssur Johannesen, Ivan Johansen Sp/f, DB Bilar og Eyðbjørn Hansen Bilsøla. Umframt hesar framsýna Súkkluhandilin í Kollafirði og Mótabúðin L‘Ey eisini.

Eins og síðst, fer FS-Vágar at gera framsýningina áhugaverda fyri tey vitjandi við ymiskum tiltøkum og undirhaldi. Báðar dagarnar verður mótaframsýning og Ragnar í Vík fer at syngja eins og kaffisøla verður og undirhald fyri børnum.

Sum nakað nýtt í ár, verður ein telda burturlutað og ein kapping veðrur millum skúlaflokkar, um hvussu nógv børn kunnu verða í einum bili í senn.

Sum nakað heilt serligt, verður eisini avdúkað, hvør útróðrarbátur í oynni fiskaði mest síðsta ár. Vinnarin fær steyp handað.

Framsýningin verður opin leygardagin og sunnudagin frá kl. 14 til 21.

Bygdaráðsformaðurin í Sørvági, Petur Kruse, setur stevnuna leygardagin kl. 15.

# 15 Plantupakkar til MBF

Eftir áheitan frá fólki, ið av einhvørjari orsøk ikki orka at standa í bíðirøð at fáa ein av teimum 500 úflýggingarseðlunum, hevur býargartnarin lati 15 útflýggingarseðlar til MBF ( Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum ). Hesi fólk kunna so ístaðin fara út í MBF-húsið, á Íslandsvegur 10c, leygardagin 6.mai, millum kl14 og 16, at fáa sær ein útflýggingarseðil.